



# Fernando Torres fekk hol á

**FÓTBÓLTUR** Í oysandi regni eydnaðist tað endiliga Fernando Torres at skora fyri Chelsea. Eisini Edin Dzeko skoraði í einum umfari, sum staðfesti at Chelsea er fremsti avbjóðari hjá Manchester United til at vinna Premier League

Tróndur Arge - Liverpool

Tað kom sum eitt sjokk gjøgnum fótbóltsheimin, tá Fernando Torres skifti til Chelsea fyri áleið eina hálva milliard krónur. Men ikki fyrr enn í 14. royndini, eftir yvir 730 málleysar minuttir, eydnaðist tað Fernando Torres at fáa bóltin í málið og Roman Abramovich at smílast. Hóast málið sum so ikki hevði nakran týdning fyri útfallið av dystinum, so sást á monnum, at hetta málið hevði stóran týdning fyri Fernando Torres og restina av Chelsea leikarunum.

## Byrjaði móti Liverpool

Fyrsti dysturin hjá Fernando Torres í bláu Chelsea troyggjuni var móti gamla felagnum, Liverpool, bara fáar dagar eftir at hann hevði skift felag. Øll eygu vóru vend móti manninum við 9-talinum á rygginum. Fernando Torres spældi teir fyrstu 65 minuttirnar, men gjørdi ikki stórvegis skaða móti gamla felagnum. Dysturin endaði við, at Liverpool fór við øllum og bráddliga sá skiftið ikki so smart út.

Eina viku seinni er Chelsea á vitjan hjá grannunum Fulham. Aftur byrjar spaniólin inni, men miðskeiðis í seinna hálvleiki verður ein vánaligur Fernando Torres útskiftur fyri Didier Drogba. Dysturin endar við javnleiki og fólk byrja so smátt at seta spurnartekin við keypið.

Síðan er Champions League á skránni. Ein av høvðusorsøkunum til skiftið var, at Fernando Torres vildi sleppa at spæla í Champions League. Tí kom tað ikki óvart á, at hann var millum teir ellivu, ið byrjaðu inni í Parkini í Keypmannahavn. Úrslitið var hinvegin tað sama – onki mál.

## Manchester United á vitjan

Tíðliga í mars mánaði kemur Manchester United á vitjan í Premier League og Chelsea skal vinna, um teir skulu varveita vónina um at vinna heimligu kappingina. Heldur ikki hendan dystin kemur nógv burtur úr hjá Fernando Torres, meðan hitt januar innkeypið, miðverjin David Luiz, vísur seg frá síni bestu síðu og skorar.

Heldur ikki á útivølli móti Blackpool ella heimavølli móti FCK ger Fernando Torres um seg. Á 27-ára føðingardegnum hjá honum, kemur Manchester City á vitjan. Men úrslitið er tað sama. Hann byrjar inn í álopnum, men verður útskiftur tjúgu minuttir fyri tíð uttan at hava skorað. Hann verður eisini innskiftur í útidystinum móti Stoke men einki hjálpur.

## Champions League

Í Champions League fjórðingsfinaluni stendur Manchester United fyri framman. Hetta er níggjunda royndin hjá Fernando Torres, men Edwin van der Sar í Manchester United málinum tekur alt sum Chelsea roynur seg við.

Í tíggjundi royndini eru glottar at hóma. Á útivølli móti Wigan spælur Fernando Torres sín fyrsta góða dyst fyri Chelsea og var tað ikki fyri ein vælleikandi Al Habsi í Wigan málinum, so kundi Fernando Torres fingið ein góðan svøvn tað náttina.

Tríggjar dagar er aftur gali og 9-arin spælur illa á Old Trafford og verður útskiftur í hálvleikinum. Chelsea verður útsligið av Manchester United í Champions League fjórðingsfinaluni.

## Rangstaddur

16. apríl skorar Fernando Torres á fyrsta sinni fyri Chelsea, men hann er rangstaddur. Fótbóltsheimurin stuttleikar sær í støðuni og trýstið á Fernando Torres veksur í hvørjum.

Heldur ikki í heimadystinum móti Birmingham liggur fyri hjá honum. Veddingarfyritøkurnar bjóða sínum kundum at spæla upp á um Fernando Torres yvirhøvur fer at skora hetta kappingarárið.

## Fernando Torres skorar

Í 14. royndini, tann 23. apríl, eydnast tað endiliga Fernando Torres at skora fyri Chelsea. Tað oysur niður í London og vøllurin á Stamford Bridge er plaskvátur. Dysturin minnur í løtum um landsdystin á Svangaskarið móti Luxembourg á sinni, ella tá KÍ í 1999 vann FM í Klaksvík móti ÍF.

Regnið skuldi tó vísa seg at verða eydnan hjá Fernando Torres. Hann varð skiftur inn eftir 77 minuttir og sjey minuttir seinni bragdaði. Hann var leysur í brotsteiginum og tað sá út til, at hann bara skuldi trilla bóltin í málið. Men váti vøllurin argaði og bólturin steðgaði upp. Helst hava øll á Stamford Bridge hugsa tað sama; "Áh nei, ikki aftur nú." Tað vísti seg tó, at váti vøllurin snýtti West Ham verjuna og bráddliga var Fernando Torres púra leysur. Við vinstra beini eydnaðist tað at fáa bóltin í málið, tað fyrsta hjá honum í 903 minuttir fyri lið og land.

## Edin Dzeko vil eisini

Manchester City keypti eisini dýrt inn í vetur. Edin Dzeko varð keypur úr Týsklandi og skuldi styrkja álopið, men ikki fyrr enn mánakvøldið eydnaðist tað honum at fáa mál í Premier League. Hóast Edin Dzeko hevur skorað mál í øðrum kappingum fyri Manchester City, so hevur hann verið eitt vónbrot í Premier League.

Spurningurin er nú um Fernando Torres verður tann, ið sleppur at flenna síðst, tí Chelsea er nú bara seks stig aftanfyri Manchester United, sum skal spæla móti bæði Arsenal og Chelsea áðrenn kappingin endar.

*trondur@sosialurin.fo*



## Ryan Giggs skrivar aftur søgu

Hann er einasti leikarin, ið hevur skorað í hvørjum einasta kappingarárið síðani Premier League varð stovnað. Hann hevur umframt tað, eisini onnur met og í gjár gjørdi hann tað so aftur.

Tá hann í seinna hálvleiki í Champions League hálvfinaluni í gjár legði Manchester United á odda, gjørdist hann tann elsti málskorarin í kappingini nakrantíð. Við sínum 37-árum og 148 døgum, hevur hann yvirhálað italiumannin Filippo Inzaghi.

Fimm teir elstu, ið hava skorað í Champions League eru:

**Ryan Giggs (37-ár 148)**
Fillippo Inzaghi (37-ár 86)
Javier Zanetti (37-ár 70)
Laurent Blanc (36-ár 334)
Paolo Maldini (36-ár 329)